# Ársfrágreiðing 2012-2013

**Demokratia – Nevndin fyri øktari javnstøðu í politikki**

# Fororð

Henda frágreiðing fevnir um virksemið hjá Demokratiu í 2012 og 2013. Saman við Javnstøðunevndini hevur Demokratia skipað fyri einum almennum fundi um fólkafráflyting, har m.a. norðurlendskir granskarar tóku lut. Nevndin hevur eisini luttikið á teimum báðum almennu fólkafundunum, tann fyrri í Havn í september 2012 og tann seinri í Klaksvík í septmber 2013. Her kom nevndin í samband við nógv fólk í øllum aldrum. Umframt básaluttøku skipaði nevndin eisini fyri fleiri fundum og tiltøkum á fólkafundunum báðum.

Demokratia hevur eisini heitt á Gallup um at gera eina kanning um javnstøðu í politikki. Kanningin vísti m.a., at flestu menn velja menn, meðan kvinnur býta sínar atkvøður javnari millum kynini. Munir eru á valdømunum, og eisini millum ymsu aldursbólkarnar.

Í apríl 2013 læt nevndin eina skuggafrágreiðing inn til CEDAW[1].

Í 2012 var bý- og bygdaráðval kring landið, og úrslitið var eitt vónbrot sæð úr javnstøðusjónarhorni. Kynsbýtið millum tey valdu var 72% menn og 28% kvinnur. Hetta er ein afturgongd à 2% í mun til bý- og bygdaráðsvalið í 2008, tá býtið var 70% menn og 30% kvinnur.

Fyri framtíðina hevði verið ynskiligt, um Demokratia kundi fingið eina hægri játtan á fíggjarlógini ella sum minstamark varðveitt ta verandi, soleiðis at nevndin kann skipa fyri eini størri røð av tiltøkum, ið kunnu eggja til størri politiska javnstøðu.

Enn er langt á mál, men sterkar kreftir arbeiða væl saman!

Sigga Óladóttir Joensen, forkvinna.

[1] ST-stovnur frá 1979, sum hevur til endamáls at beina burtur kynsmismun móti kvinnum um allan heimin.

# Demokratia

Demokratia er nevnd sett av Føroya landsstýri í 2006. Arbeiðssetningur nevndarinnar er soljóðandi:

*Nevndin skal skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum til tess at økja um leiklutin hjá kvinnum í politiskum avgerðum, so talið á kvinnum á løgtingi og í kommunustýrunum økist, og umboðanin samsvarar á leið við umboðanina í hinum Norðurlondunum. Um ársskiftið 2007/2008 handar nevndin landsstýrismanninum frágreiðing um virksemi sítt og tilmæli um, hvussu framhaldandi eigur at verða arbeitt fyri at fremja javnstøðu, har politiskar avgerðir verða tiknar.*

Í viðmerkingunum til uppskotið um nevndina stendur um virksemið hjá nevndini:

*Nevndin skal til ársskiftið 2007/2008 arbeiða fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir. Nevndin arbeiðir støðugt við at fremja arbeiðssetningin, meðan hon er sett. Arbeiðið eigur at fevna um tiltøk, sum kunnu gera fólk varug við týdningin av, at fleiri kvinnur verða umboðaðar, har politiskar avgerðir verða tiknar. Virksemið kann vera upplýsing, lýsingaátøk, undirvísing og útgáva av ymsum kunnandi tilfari.*

*Løgtingsvalið, sum eftir ætlan verður í januar 2008, verður eitt gott høvi at máta úrslitið av arbeiðinum hjá nevndini.*

**Stutt um søgu nevndarinnar**

18. november 1999 samtykti Føroya løgting uppskot um tilráðingar frá Útnorðurráðnum[2] í 1999 um at seta eina nevnd at arbeiða fyri at økja um kvinnuleiklutin í politikki. Útnorðurráðið heitti á grønlendska og føroyska landsstýrið um at seta eina slíka nevnd. Í tilmælinum frá Útnorðurráðnum varð víst til eitt átak í Íslandi, har altingið hevði sett eina líknandi nevnd at leggja tvørpolitisk átøk til rættis fyri at økja um talið á kvinnum í politikki. Úrslitið av hesum tiltaki var gott og hevði við sær munandi øking av talinum á kvinnum í altinginum.

1. januar 2006 setti Føroya landsstýri Nevndina fyri øktum kvinnuleikluti í politikki. Hetta heldur tunga navnið gjørdi nevndin í november 2006 av at broyta til *Demokratia*. Nevndin fekk tvey ár at arbeiða í, fram til ársskiftið 2007/08. Av tí at broytingar máttu gerast í valinum av nevndarlimum, lá virksemið næstan stilt til august 2006, tá nevndin fór til verka.

Nevndin skipaði fyri kampagnuvirksemi og ymsum almennum tiltøkum. Um ársskiftið 2007/08 handaði nevndin landsstýrismanninum í javnstøðumálum álit[3] um virksemi sítt og tilmæli um, hvussu framhaldandi eigur at verða arbeitt fyri at fremja javnstøðu í føroyskum politikki. Hereftir varð nevndin fyribils niðurløgd. Í august 2008 varð nevndin sett av nýggjum og hevur virkað síðan tá.

---

[2] Vestnordisk Råd Rekommandation nr. 1/9 frá 1999.

[3] Álitið kann takast niður á http://www.vmr.fo/Files/Filer/VMR/Fragreidingar/Alit_um_oktan_kvinnuleiklut.pdf .

**Tilnevning og skrivstovuhald**
Demokratia er skipað við 11[4] umboðum:

- einum umboði fyri hvønn politiskan flokk
- einum umboði fyri Kommunusamskipan Føroya (KSF)
- einum umboði fyri Føroya Kommunufelag (FKF)
- einum umboði fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya
- einum umboði fyri Javnstøðunevndina.

Nevndarlimirnir í 2012 og 2013 vóru:

Fólkaflokkurin:
Ruth Johannesen (fram til apríl 2013)
Sunniva Bjarnastein (síðani juni 2013)

Sambandsflokkurin:
Maud Poulsen (fram til september 2013)
Annbritt Toftegaard (síðan oktober 2013)

Javnaðarflokkurin
Ingun Eidesgaard (forkvinna fram til august 2012)
Sigga Óladóttir Joensen (síðani september 2012, forkvinna síðan oktober 2012)

Sjálvstýrisflokkurin
Kristina L. Toftegaard (fram til mai 2012)
Teitur Vágadal (september 2012 – oktober 2013)
Beinta Klakkstein (síðan oktober 2013)

Tjóðveldi
Petur í Gong (fram til januar 2012)
Margretha Nónklett (mai – august 2012)
Tórbjørn Jacobsen (síðan august 2012)

Miðflokkurin
Mia av Kák Joensen (fram til apríl 2012)
Karin Lamhauge (apríl 2012 – juni 2013)
Randi Andrasson Skaalum (síðan juni 2013)

Framsókn
Hans Arnfinnson Norðfoss

Kommunusamskipan Føroya
Ingibjørg Berg (fram til februar 2013)
Signhild Vilhelmsdóttir Johannesen (síðan februar 2013)

[4] 10 umboð hava verið fram til august 2011, tá nevndin varð víðkað við einum umboði aftrat úr Framsókn.

Føroya Kommunufelag
Karl A. Olsen (fram til januar 2013)
Pauli T. Petersen (síðan juni 2013)

Kvinnufelagasamskipan Føroya
Annika Sølvará (fram til juni 2013)
Tina K. Jakobsen (síðan juni 2013)

Javnstøðunevndin
Guðrið Joensen

Nevndin var skipað við Siggu Óladóttir Joensen sum forkvinnu í oktober 2012. Sigga avloysti Ingun Eidesgaard, sum tók seg úr nevndini í august 2012.

Nevndin hevur frá byrjanini í august 2006 havt felags skrivstovuhald við Javnstøðunevndina. Parttíðarnevndarskrivari er Bjørg Jacobsen.

# Nevndararbeiðið 2012 og 2013

**Játtan og nevndarfundir**
Játtanin hjá Demokratiu var 186.000 kr. í 2012 og 2013.

Seks nevndarfundir hava verið í 2012, og sjey í 2013.

**Almennur fundur við um fólkafráflyting 23. mai 2012**
Demokratia skipaði saman við Javnstøðunevndini og í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya fyri einum almennum fundi í Østrøm 23. mai. Norski kynjagranskarin Siri Gerrard legði fram um kyn og broytt bústaðarmynstur í útjaðaranum í m.a. Noregi. Íslendska Magnfríður Júlíusdóttir, granskari við Háskúla Íslands, tosaði um, hvussu pláss kann skapast til útbúnar kvinnur í lokalsamfelagnum. Hans Pauli Strøm, sosiologur, legði fram um demografisku vandastøðuna við minkandi ungum kvinnuættarliðum. Teitur Vágadal, sjúkrarøktarfrøðislesandi og nevndarlimur í MFS (Meginfelag føroyskra studenta), tosaði um umstøðurnar hjá lesandi í Føroyum, herundir politiska og fíggjarliga javnstøðu.

Hereftir fór fundarfólkið upp á gólv at kvøða Gentukæti.

**Gallup-kanning um javnstøðu í politikki**
Summarið 2012 varð ein Gallup-kanning gjørd um javnstøðu í politikki eftir áheitan frá Demokratiu. Kanningin vísti m.a., at flestu menn velja menn, meðan kvinnur býta sínar atkvøður javnari millum kynini. Veljararnir í Norður- og Suðurstreymoy býta í sínar atkvøður javnari millum kynini enn restin av landinum. Fólk í aldursbólkunum 18-24 ár og 40-49 ár býta atkvøðurnar javnari millum kynini enn hinir aldursbólkarnir, og jú longri/hægri útbúgving, jú javnari verður valt millum kynini. Meirilutin er ímóti at lóggeva um javnstøðu, tó eru menn meira ímóti enn kvinnur.

Meginparturin heldur, at flokkarnir áttu at hildið átøk fyri at økja um javnstøðuna í politikki. Kanningin kann lesast á www.demokratia.fo.

**Almennur fólkafundur 2012**
Demokratia luttók á almenna demokratiska fólkafundinum í Havn 21-22. september. Nevndin hevði ein litríkan bás í høllini, har armbond við Demokratia-logo vórðu býtt út, og gestirnir fingu tilboð um at fáa málað lilla strípur (logo) á kjálkan. Haraftrat var tipping um kynjaumboðanarprocentið á bý- og bygdaráðsvalinum í november 2012.
Haraftrat vóru hesi tiltøk leygardagin 22. september:

Marna Jacobsen, ritstjóri, og Bergur Poulsen, stjóri í Havsbrún og form. í Føroya Arbeiðsgevarafelag, kjakaðust um kynskvotering í politikki, málburð, mentan og vinnulív.
Bárður Persson, sjónleikari, hitaði upp við *Vit skulu kraftedeme hava okkara rættindi!*
Heðin Mortensen og Gunvá við Keldu, borgarstjórar í ávv. Havn og Klaksvík, kjakast um javnstøðu í kommunupolitikki.

**Bý- og bygdaráðsvalið 2012**
Facebook-vangin var virkin upp undir bý- og bygdaráðsvalið 13. november 2012. Ein kampagna, sum eisini varð nýtt í 2011, við myndum og regluligum tekstum var virkin frá á vári fram til bý- og bygdaráðsvalið í november. Nevndin sendi áheitan til politisku flokkarnar um at stremba eftir javnstøðu á uppstillingarlistunum. Postkort við føroyakorti yvir kynsbýtið í ymsu kommununum vórðu løgd á almenn støð. Í november vórðu nakrar sjónvarpslýsingar sendar við áminning um skeiva kynsbýtið í bý- og bygdaráðsstýrunum.

Men bý- og bygdaráðsvalið var eitt vónbrot sæð úr javnstøðusjónarhorni. Kynsbýtið millum tey valdu var 72% menn og 28% kvinnur. Hetta var ein afturgongd í mun til seinasta bý- og bygdaráðsval í 2008, tá býtið var 70% menn og 30% kvinnur. Fýra bý/bygdaráð fingu als onga kvinnu valda í 2012, meðan bara eittans bygdaráð var einkynjað á valinum í 2008.

**Yvirlit yvir uppstillað, atkvøðubýti og vald býtt eftir kyni á bý- og bygdaráðsvalunum 2004, 2008 og 2012**

| Í % | Uppstillað | | Atkvøðubýti | | Vald | | Kommunstýri uttan kvinnur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | M | K | M | K | M | K | |
| 2004 | 68 | 32 | 72 | 28 | 77 | 25 | 2 |
| 2008 | 61 | 39 | 69 | 31 | 70 | 30 | 1 |
| 2012 | 65 | 35 | 72 | 28 | 72 | 28 | 4 |

**CEDAW-skuggafrágreiðing**

Í apríl 2013 læt Demokratia inn eina CEDAW-skuggafrágreiðing[5] inn. Ein CEDAW-frágreiðing verður javnan við nøkrum árum ímillum latin inn til CEDAW frá almennu myndugleikunum. Aftrat hesum kunnu felagsskapir tó eisini innlata eina sokallaða skuggafrágreiðing við hugsanum, ynskjum, hugskotum osfr.

Í skuggafrágreiðingini greiðir nevndin frá arbeiðinum, hon hevur gjørt síðan 2009. Dentur verður lagdur á, hvussu umráðandi tað er at samstarva við politisku flokkarnar til tess at bøta um javnstøðuna. eisini verður greitt frá týdninginum at upplýsa ungfólk um javnstøðu

Skuggafrágreiðingin kann lesast á www.demokratia.fo.

**Almennur fólkafundur 2013**

Demokratia luttók á almenna demokratiska fólkafundinum í Klaksvík 20-21. september. Eins og í 2012 hevði nevndin fleiri interaktiv tiltøk, t.d. andlitsmáling og atkvøðukappingar, umframt at armbond o.a. vórðu útlutað.

Harumframt skipaði nevndin leygardagin 21. september fyri einum kjakfundi við fýra vinnulívsfólk og eitt floksumboð úr hvørjum politiskum flokki.

[5] CEDAW = *Convention on the Elimination of All Forms of Discrimination against Women* er ein ST-konventión frá 1979. Føroyar hava ikki sjálvstøðuga umboðan í ST, men gjørdust bundnar av konventiónini um at avtaka allan kynsmun móti kvinnum, tá Danmark skrivaði undir konventiónina 21. mai 1983. Harumframt samtykti løgtingið 31. mars 1987 at seta konventiónina í gildi fyri Føroyar. Sí annars http://www.un.org/womenwatch/daw/cedaw/